

# Hydro vil hava milliardir til gransking

**Jan Müller**

31.05.2014 - 20:35

Oljan.fo

Hydro, sum hevur verið ein berandi fyritøka á Karmøy tey seinastu 40 árini, hevur stórar ætlanir.

Fyritøkan ætlar skipa eina stóra granskingarmiðstøð á oynni, og eydnast tað at fremja ætlanina í verki, lovar felagið at útvega 200 nýggj ídnaðararbeiðspláss har. Tað skrivar Dagens Næringsliv.

Í fyrsta umfari er ætlanin at byrja við 50 starvsfólkum, men tað verður so í fyrsta lagi í 2017. Síðani fer tað at taka minst fimm ár at fullføra ætlanina um eina veruliga granskingarmiðstøð.

Higartil hevur Hydro fingið knappar 40 milliónir krónur frá norska statinum til at royna tøknina, men nú hevur fyritøkan søkt um at fáa 1,8 milliard krónur afturat úr tí almenna grunninum, sum hevur til endamáls at stuðla veðurlagstøkni.

Allar súður eru kortini ikki syftar, um Hydro fær pengarnar, tí tann serligi eftirlitsstovnurin hjá EFTA, ESA, skal eisini góðkenna verkætlanina, skrivar Dagens Næringsliv.